UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **3. mai 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-105**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-170/2021 frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, um føroyskan limaskap í IOC.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er gongd í málinum um at tryggja Føroyum limaskap í altjóða olymisku nevndini (IOC)?
2. Lúka Føroyar formligu treytirnar fyri limaskapi í altjóða olympisku nevndini?
3. Um ikki, hvør er forðingin fyri, at Føroyar kunnu gerast limur í altjóða olympisku nevndini?
4. Nær kunnu vit vænta, at Føroyar kunnu luttaka á olympisku leikunum?

Svar

Til 1: Sambært ÍSF verður støðugt arbeitt við málinum at tryggja Føroyum limaskap í IOC. Talan er um eitt áhaldandi arbeiði, sum hevur verið í gongd uttan íhald síðani 2017. Hugsanin hjá ÍSF við hesum arbeiði er, at vit í Føroyum mugu arbeiða fyri limaskapi á øllum mótum, og at vit mugu vera klár, tá ið møguleikin fyrr ella seinni býðst. Seinastu árini hava fleiri ítróttagreinar fingið altjóða limaskap, og at fáa limaskap í IOC er ein partur av tilgongdini hjá ÍSF.

Til 2: Í olympisku evstulógini stendur í grein 30: "In the Olympic Charter, the expression “country” means an independent State recognised by the international community." ÍSF metir, at Føroyar í dag lúka hesa treytir. Tá ið Føroyar í 1984 upprunaliga søktu um limaskap í IOC, t.e. áðrenn olympiska evstalóg varð broytt í 1996, hevði IOC í 1987 góðtikið føroysku umsóknina, og hon lá klár at koma fyri kongressina. Tí er tað fatanin hjá Føroyum, at vit bæði kunnu fáa limaskap við støði í umsóknini frá 1984 og treytinum, ið eru galdandi í dag.

Til 3: ÍSF upplýsir, at forðingin fyri limaskapi í IOC sambært IOC er, at Føroyar ikki lúka núverandi formellu treytirnar fyri limaskapi sambært grein 30 í olympisku evstulógini. Hesum eru Føroyar ósamdar í.

Til 4: So leingi sum Føroyar ikki hava limaskap í IOC, sleppa Føroyar ikki at luttaka í olympisku leikunum.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður